RØÐA P. M. DAMS Á FÓLKATINGI

Framhald

Hjemmestyreordningen var ikke alene en nyordning, men en nyordning, der hvilede på en nydannelse af frihedsbegrebet i forholdet mellem to broderfolk, der på frivillighedens grund önskede at knytte deres skæbne sammen og dog ikke alene at bibeholde, men også glæde sig over hinandens selvstændige kultur, særegne liv og nationale særpræg og selvbestemmelsesret paa de områder og med hensyn til de særanliggender, hvor det ökonomiske og styrelsesmæssige ansvarnaturligt hviler hos een. Den idémæssige nydannelse består i, at det skal stå de to parter, regeringen og hjemmestyret hver for sig eller i fællesskab indenfor et meget vidt omspændende område af sager til en hvilken som helst tid frit at bestemme, hvilken sag eller hvilke sagområder der skal overgå til hjemmestyret.

Til illustrering af, hvor large og frisindet man viste sig fra rigsdagens og regeringens side, kan jeg i denne forbindelse ikke undlade at anföre, at engang, da jeg på et politisk möde lancerede denne form for en lösning af de dengang så stærkt omdebatterede nationale og styrelsesmæssige problemer, udtalte formanden for folkeflokken, hr. kongsbonde Johannes Patursson, at det löd meget smukt og besnærende, men der eksisterede ikke den statsmand i verden, der gik ind for en sådan ordning. Men det skete. Det storslåede og kloge frisind fandtes i den danske rigsdag, hos den danske regering og konge. Det siger vi tak for. Det glemmer vi aldrig.

Og nu er der gået 5 år siden nyordningens gennemförelse, og jeg tör sige, at den har indfriet mere, end man turde håbe. Den har vist sig at være det rigtige grundlag for det idelle samarbejde og samhörighedsforhold, som hele rigsdagen, det danske folk såvel som en overvældende del af det færöske folk gerne ser.

På Færöerne blev der af modstanderne hævdet, at lagtingets lovgivningsmagt på de i hjemmestyreloven nærmere fastsatte områder ikke holdt for domstolene. Det samme blev anfört af danske jurister som Poul Meyer, idet de henviste til grundlovens paragraf, der siger, at lovgivningsmagten er hos kongen og regeringen i forening. De påstod, at regeringen og kongen ikke kunne bortdelegere denne lovgivningsmagt, hverken helt eller delvis. Men vi henviste til professorerne Alf Ross og Poul Andersen og alle de jurister, der havde været med til at forme hjemmestyreloven. Af professorernes responsum fremgik det, at den i hjemmestyreloven nedfældede bortdelegering af lovgivningsmagten til lagtinget ikke stred imod grundloven.

Vore modstandere anförte også og angav det som et vægtigt moment, at i 1915, da grundlovens paragraf vedrörende lovgivningsmagten blev vedtaget, havde de lovgivende herrer næppe forudset muligheden af en bortdelegering af regeringens og kongens lovgivningsmagt, selvom det kun drejede sig om begrænsede områder for en meget stærkt afgrænset lille del af rigets indbyggere.

Her stiller forholdet sig helt anderledes, efter at forudsætningen for grundlovens lovgivningsparagraf nu har været til fornyet behandling hos professorerne i grundlovsudvalget og i rigsdagen forinden grundlovens vedtagelse. Efter forelæggelsen af det af den höjtærede statsminister indhentede responsum fra de herrer professor Alf Ross og Poul Andersen, hvori disse igen erklærer hjemmestyreloven hjemlet i grundloven, og efter at det samlede grundlovsudvalg, hvor alle partier er repræsenteret, og det samlede folketing ikke har reageret imod professorernes responsum og således må siges at have tiltrådt det, må al tvivl om lagtingets lovgivningsmagt på de i hjemmestyreloven nærmere bestemte områder siges at være udelukket.

Hvis der efter mit skön var nogen grund til tvivl om hjemmestyrelovens grundlovsmæssige lovgivningshjemmel, kunne hverken jeg eller nogen, der går ind for nyordningen, stemme for grundloven uden en tilföjelse til § 3. Såfremt der ikke fra nogen af det höje tings medlemmer reageres imod min opfattelse, föler jeg mig i overensstemmelse med samtlige det höje tings medlemmer i dette for mig som færösk repræsentant så afgörende spörgsmål, og jeg vil ikke alene stemme for grundloven, men göre mit til, at man gör det på Færöerne.

HVAT ER OG VIL *sosialisman?*

(Framh. úr nr. 9)

Tað sást eisini, hvussu teir allastaðni innan tær Sameindu tjóðirnar viðurkenna tær sosialistisku hugsjónirnar í sambandi við hjálpina til lágtstandandi lond (sjálvt um teir av dogmatiskum orsökum helst vilja sleppa frá at taka orðið sosialismu uppá ini.

Hetta er ein formur fyri kollveltingarhugsan, ið ógvuliga avgerandi brýtur frá tí eldru marxistisku kollveltingarhugsanini, ið sigur, at hitt veika og vánaliga í kapitalistisku samfelagsskipanini skal mókast líðandi, so tað verður í einari kollveltingarstöðu, haðani sosialisman, sum ein Föniksfuglur, hevjar seg úr öskuni. Stöðan í dag er ikki kollvelting og sosialisma, hetta sjónarmiðið skilur seg avgerandi frá tí fyrra av tí, at tað kallar á fólksins sjálvsluttöku, hin einasta prosessin, ið av sær sjálvum (við »sjálvvirkandi kreftum«) er leiðin til kollvelting, ið knasar alla mentan og civilisatión.

6) Sosialisma uttan frælsi er óhugsandi, bert frælsi kann vissa okkum eitt stættarleyst samfelag, tí har tað ikki er frælsi, mugu tað verða minst tveir stættir, ein ráðandi stættur og ein kúgaður stættur. Hitt sosialistiska frælsið er óloysiliga samantvinnað við hugtökini frælsi og bróðurskapur, sosialistarnir kunnu tí ikki viðurkenna nökur rættindi, ið avmarka frælsið hjá öðrum í frælsisins misbrúkta navni; sosialistiska frælsið er frælsi felagsskapsins (»Vit eru eitt blóð tú og eg«), kapitalistiska frælsið er frælsi rovdjóranna (»Éti eg ikki teg, etur tú meg«), sosialistiski javnaðurin er javnaður bróðurskapsins, javnaður kapitalistanna er »hin hátt hevjaði javnaðurin fyri lógini, ið noktar ríkum sum fátækum at bidda úti á götunum, at sova undir brúnni og at stjala breyð« (Anatole France). Heimsins största svik er svikið móti frælsishugtakinum. »Kommunistisku« agitatorarnir taka frælsisnavnið fram og draga tað gjögnum teirra agitatorisku köstarennur, meðan sannleikin er tann, at tey sokallaðu »kommunistlondini« ongantíð hvörki veruliga ella alment hava viðurkent S.t.-boðskapin um mannarættindini. Eitt samfelag uttan frælsi kann aldri verða sosialistiskt, tess ymisku stig av ökonomiskari »effektivitet« eru bert ymisk stig í raðnum av kapitalistiskari »effektivitet«, ið fevna frá moderatari liberalismu til oligarki (fámannaveldi). Tey »kommunistisku« londini við statsökonomi og einum lítlum valdsharraringi, hava eingi av sosialismunnar grundhugtökum, frælsi, javnaður og bróðurskapur, skipanin kann einans metast sum oligarki, tað, ið Jack London kallar »Jarnhælin«, hæddin av kapitalismu; munurin millum »kommunismu« og nasismu er verunliga einans litir og orð. Bæði hava tey felags, at tey við frekjuliga at misbrúka navn sosialismunnar royna at villleiða fólkið. Henda »kommunisman« umboðar heimsins mest ágrýtnu eyðræningarskipan til mergsúgving av arbeiðarunum, ein valdsharraring, sum ein nýggjan yvirklassa (við gapandi avgrundum millum tær hægstu og lægstu löningarnar, munurin er 30:1). Túsundtals frágreiðingar og vitnisburðar frá teimum óteljandi flóttarfólkunum, ið kropin eru gjögnum smogurnar í jarntjaldinum, siga frá, hvussu trældómurin verður innfördur av nýggjum, um miljónir av menniskjum, ið liva undir korum, ið ein ikki vildi funnið uppá at givið húsdjórunum, og sum mugu træla fyri stýrið líka til hin seinasti lívsneistin slóknar. (Sí bókina »Stalins slavelejre«, útgivin av fría fakliga internationala).

Sosialistarnir hava onga orsök at föra bardagan á tveimum frontum, bardagin er framvegis millum sosialismu og kapitalismu, sjálvt um kapitalisman skírir seg okkurt annað, byggir á hina sáliggerandi eginnyttuna ella bert á hardræði og villleiðandi og tápuliga propaganda. Onkur europeisku javnaðarmonnunum til vil óivað siga, at stöðan hjá vesturverndarspurningin forbronglar hugtökini, men ein eigur at minnast til, at javnaðarmenn hava ikki viðurkent hvönn sum hels dubbingarpolitikk. Verjan av demokratinum er tað avgerandi, og dubbingarpolitikkurin verður veikur og til lítla nytta, um ikki heimshernaðurin móti fátækradöminum samstundis heldur áfram. Tað, at danskir javnaðarmenn eru gingnir við til Atlantssáttmálan, er einki ástarband við kapitalsimuna, men ein neyðug samgonga við tað *óhugnaliga* fyri at verja seg móti tí *versta*.

(Framh. í næsta blað).

TÓRSHAVNAR LÍKKISTUGOYMSLA
hevur telefon nr. 706
ymiskir prisir
JACOB C. JOENSEN
snikkari

Grót og skervur.

Øll, ið vilja keypa skerv ella grót eiga at venda sær til kommunukantórið.

Grót og skervur megu verða goldin fyrst, áðrenn tey verða heimtað.

Bilstjórar verða ámintir, at teir ikki kunnu heimta grót ella skerv uttan við einum limi av vegnevndini ella einum umboðsmann fyri kommununa.

Fróðbiar sóknar kommuna

FÆRÖSK MARGARINE

VITA № 1

VITAMINISERET

FÆRØSKT PRODUKT FINT PRODUKT